# Meira tíðaravmarkað parkering

**Parkeringsskipanin í høvuðsstaðnum verður nú broytt, soleiðis at fleiri parkeringsøki kring býin verða gjørd tíðaravmarkaði. Hetta merkir, at parkeringsvørðarnir fara at koma longur út um býin**

PARKERINGS-VIÐURSKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á tíðindafundi á skrivstovuni hjá borgarstjóranum í Havn í morgun, var greitt frá nøkrum broytingum í parkeringsskipanini í Tórshavnar Kommunu. Ein av hesum broytingum er tann, at parkeringsvørðarnir í framtíðini fara at koma meiri út um býin at hava eftirlit við parkeringini.



*Jón Klein Olsen, varapolitikommiserur, Karen Marie Olesen, fúti og Heðin Mortensen, borgarstjóri, á tíðindafundi á býráðnum í morgun.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Ætla at broyta hugburðin

Millum teirra, sum vóru við á tíðindafundinum, vóru Heðin Mortensen, borgarstjóri, Karie Marie Olesen, fúti og Jón Klein Olsen, varapolitikommiserur. Tey søgdu, at tað er teirra vón, at hugburðurin hjá føroyingum viðvíkjandi parkering kann broytast í framtíðini.

-Tað verður meira og meira tíðaravmarkað parkering í býnum. Sum heild kann sigast, at jú longur burtur frá miðbýnum tú parkerar, tess longri tíðarskeið kann bilurin standa, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri. Hann sigur, at við at gera meiri tíðaravmarking inni í býnum, verður tað vónandi lættari at sleppa av við bilin í dagligdegnum, um tú gert tær onkur ørindi í miðbýnum.

Summar broytingar eru longu framdar í parkeringsskipanini, og millum annað er alt tað stóra parkeringsøki á Hálsi við bilasøluna hjá Johannes Berg ikki longur óavmarkað, og nú er bert loyvt at parkera har í fýra tímar í senn.

### Neyðugt at útvega fleiri parkeringspláss í framtíðini

Býráðið í Havn ásannar tó eisini, at tað er stórur tørvur á parkeringsplássum í miðbýnum, og havandi í huga Norðoyatunnilin, sum letur upp komandi ár, verður tað neyðugt hjá Tórshavnar Kommunu at útvega fleiri og fleiri parkeringspláss.

- Spurningurin er so, um vit so skulu byggja stór parkeringshús í fleiri hæddum, ella um vit møguliga skulu grava niður í jørðina og gera parkeringskjallarar, sigur Boði Haraldsson, býarverkfrøðingur.

Jón Klein Olsen, varapolitikommiserur, sigur, at býurin er við at kvalast í bilum, og tað verður allatíðina arbeitt við at loysa parkeringstrupulleikarnar í miðbýnum. Millum annað er ein opin spurningur, um teir borgarar, ið búgva inni í býnum, skulu hava serligar sømdir, tá ið tað snýr seg um parkering í hesum øki.

## Inn at sita fyri kapp-royring

**Ein 30 ára gamal maður var í Føroya Rætti í gjár dømdur 40 daga treytaleysa fongsulsrevsing fyri kappkoyring. Harumframt fekk maðurin hálvtannað ára treytaleysa frádøming av koyrikortinum**

KAPPKOYRING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Maðurin er dømdur fyri saman við einum øðrum at hava koyrt kapp á Havnagøtu og á Kongabrúnni í august mánað í ár. Somuleiðis koyrdi maðurin ímóti ferðsluni, og tað endaði við einum samanstoyti við ein mótkoyrandi bil.

### Ákærin nøgdur

Dómurin, sum fall í Føroya Rætt í gjár, er í tráð við tað, sum ákærin í málinum, Linda Hesselberg, hevði kravt. Á rættarfundinum fyri viku síðani kravdi ákærin, at tann ákærdi bleiv dømdur 40 daga treytaleysa fongsulsrevsing, og at hann harafturat skuldi missa koyrikortið í hálvtannað til tvey ár. Tí er Linda Hesselberg nøgd við dómin, sum Føroya Rættur segði í gjár.

- Eg eri nøgd við dómin, tí tað hevur verið leingi verið ein trupulleiki við kappkoyring í høvuðsstaðnum. Við hesum dómi hevur Føroya Rættur vónandi givið eitt greitt tekin um, at hetta ikki verður góðtikið, og at tú kanst rokna við treytaleysari fongsulsrevsing, um tú koyrir skilaleyst, sigur Linda Hesselberg.

Hin bilførarin, sum var við í kappkoyringini, hevur noktað seg sekan í at hava tikið lut í kappkoyring, men málið móti honum verður væntandi reist í næstum. Linda Hesselberg sigur, at tann bilføraran kann vænta sær ein ákæru. Ákærin sigur, at dómurin, sum fall í gjár, fer at hava ávirkan á tað málið.

- Maðurin, sum bleiv dømdur í gjár, játtaði seg partvís sekan í at hava koyrt kapp, og tað skulu jú tveir bilar til eina kappkoyring, sigur Linda Hesselberg at enda.

# Parkeringsvørðar fingið nýggja útgerð

**Teir báðir parkeringsvørðarnir í Havn hava fingið nýggja útgerð, sum ger tað nógv lættari hjá teimum at skriva út bøtur. Útgerðin er royndarkoyrd síðstu vikurnar við góðum úrsliti, og tey bæði eru væl nøgd við útgerðina**

PARKERING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Teir báðir parkeringsvørðarnir í Havn, Thordur Thorsteinsson og Annika Joensen, við nýggju útgerðini og í nýggju búnunum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Talan er um skipanina Ticket-Man, ið er ein skipan, har parkeringsvørðarnir nýta eitt elektroniskt tól, tá ið tey skriva bøtur. Tá ið parkeringsvørðarnir leggja til merkis ein bil, ið stendur ólógligani parkeraður, verða upplýsingarnar trýstar inn á tólið. Tá ið hetta er gjørt, skrivar tólið út ein lepa, ið verður festur á sjálva bótina. Á lepanum eru allar tær neyðugu upplýsingarnar viðvíkjandi ólógligu parkeringini.

### Beinleiðis inn á telduskipan

Eftir loknan arbeiðsdag fara parkeringsvørðarnir aftur á politistøðina, har tey halda til. Har verða tólini sett til teldu, ið síðani tekur dagsins upplýsingar inn av tólinum, og soleiðis verða allar bøturnar koyrdar beinleiðis inn á eina telduskipan.

Parkeringsvørðarnir báðir lata væl at nýggju skipanini, og tey siga, at tað er nógv lættari at arbeiða við nýggju útgerðini.

Samstundis sum parkerinsvørðarnir hava tikið nýggju útgerðina í nýtslu, hava tey eisini fingið nýggjar búnar. Sum nevnt aðrastaðnis á síðuni, so er ætlanin, at tey bæði skulu koma longur út um býin, og hetta fer ivaleyst at hava við sær, at ein parkeringsvørður verður settur afturat, váttar Heðin Mortensen, borgarstjóri.

- Tað kann væntast, at vit fara at seta eitt fólk afturat, tí tað verður ivaleyst tørvur á tí. Men sjálvsagt skal politiskur vilji fáast fyri hesum, sigur Heðin Mortensen. Hann leggur afturat, at tað er heldur ikki óhugsandi, at flutningstól verða keypt, ið skulu gera parkeringsvørðarnar meiri „mobilar“, sum borgarstjórin málber seg.